Føroyingar í Nowherelandi:

# - Hvat gera vit við fananskapin í okkara tíð?

*Kim Simonsen*




30 Sosialurin Nr. 158 - 21. august 2004

Føroyingur í dixieland

KRONIKKIN

*– Tað er sum um Jóanes roynir at endurskapa eina sundurskotna hugmyndafrøði við at rópa um suverenitet fyri mordarar. Sum so er einki nýtt, tí alt tað Jóanes hevur vart hevur fullkominliga vanvirt menniskja alla 20. øld. og sjálvandi skilir hann ikki, at eg og onnur ikki vilja við til hetta utopia, ella hendan »einkistað« ella »óstað«, sigur Kim Simonsen m.a. í viðmerking til Jóanes Nielsen*

César Vallejo var ein yrkjari frá Peru. Nakrar av hansara yrkingum eru ótrúliga eymar og fullar av eini bløðandi samkenslu við teim veikastu millum okkum. Sviin og javnaðarmaðurin Roy Andersson gjørdi í 2000 ein film um eina av hesum yrkingum. Filmurin er eisini ein sorgblíð og kritisk mynd av okkara tíð og kreppuni í svenska vælferðasamfelaginum. Filmurin kallast »Sånger från andra våningen«. Men filmurin er ikki bert um vælferð, men um okkara felagsmenniskjaligu skuldarkenslur, tí í 20. øld hevur lukturin av fangalegum, hópgravum og týningarlegum ligið tjúkkur um alt Europa og tað mesta av heiminum. Vit byggja hús og stovnar oman á nakkaskotnum fólkum og oman á hópgravir. Í 20. øld stóðu Týskland og Russland fyri eini umfatandi týning av minnilutum. Allir evropeiskir sigoynarar, jødar, menningartarnað og onnur vórðu týnd. Í Russlandi m. a. kulakkar og øll, ið komu at standa fyri. Síðani kom kalda kríggið, og alt varð svart og hvítt. Kommunistar yvir fyri »yankee« pro-amerikanarum. Hetta er enn heimsmyndin hjá t. d. Jóanesi Nielsen, svart og hvít, (ella reytt og blátt), ið er júst tað Roy Andersson heldur hevur skapt »Vår tids rædsla i alvor« - fananskapin í okkara tíð. Hendan heimsmyndin gloymir skuldina, gloymir menniskjað og hugsar í abstraktum blokkum og hugmyndafrøði.

Roy Andersson er ein listamaður, ið er nærum eins vinstravendur og Jóanes, men Roy er fyrst mannavinur og humanistur og síðani kann alt hitt koma. Hvør tann einasti filmurin hjá Roy er á tremur av deyðum jødum, men Jóanes hevur nú ongantíð, mær vitandi, syrgt tey deyðu í greinum, yrkingum ella bókum í eini 30 ár, hann hevur sæð veruliga fíggindan, ið eru eini fýra borgarafrúur á Snobhill í Havn, handilsmenn og onkur bygdasligur deknur, ið er limur í Lyons Club. Sjálvandi skulu hesi eyðmíkjast, tey eru stattarfíggindin, sigst Jóanes at siga. Einki er ov smátt fyri Jóanes, alt skal við, bileigarar, reiðarar og forkølaðir fólkafloksmenn. Ikki tí Jóanes hevur nú mangan rætt í sínum djørvu atfinnungum. Mær dámar tó ikki, at fólk deila heimin í tveir partar. Jóanes sigur seg berjast fyri friði og Irak á Vaglinum, men eg livi í Dixieland í »The US of A«. Um so eg livi í Dixieland, so tykist Jóanes enn liva sum fangavørður í Gulag, í fortíðini.

Í filminum hjá Roy Andersson hópa tey deyðu seg upp, og høvuðspersónurin, Kalle, vil ikki kennast við hetta. Hann vil sum øll onnur hugna sær og hava tað gott, men aftan á hann gongur ein hongdur ungur maður í hamferð. Ein 19 ára gamal russari, ið er tikin av døgum av politiskum ella vantandi orsøkum, sum eini 20 milliónir fólk í USSR. Sum eini 20 milliónir ella fleiri Maosa Kina. Sum 1.5. milliónir børn í Irak, ið doyðu av ST-revsitiltøkunum, sum 200.000 kurdar í Irak, sum 100.000 shiamuslimar, sum øll tey Stalin- og Hitlerinspireraði fullveldisleiðarin í fyrrverandi suverena statinum Irak fekk hug at skjóta, heingja, fóðra hundar við, pína til deyðis, skera eygunu úr, grava livandi, seta streym til o.s.fr.

Tað er eitt stórt brotsverk, at USA og sameind hava givið Irak ein møguleika at fáa veruligt frælsi framyvir, fullveldi, mannarættindi og fólkaræði staðin fyri »helviti á jørð« við suvereniteti og hópgravum.

Tað er eitt »satt« brotsverk at velja mannarættindi fram um eitt skjótt avoldað suverenitetsprinsipp frá fólkarættinum. Tað er groft ikki at liva lívið víðari við ST-revsitiltøkum, ella við 200.000 fleiri dripnum kurdum, 100.000 steindeyðum shiamuslimum og at harra fullveldisleiðari Saddam ikki kann sleppa at týna tann ella tey, hann og synirnir hava hug á fyri tíðina. Tað er nú eisini for galið, at eg og Brynhild Thomsen ikki fóru á Vaglið at savnaðst við seinastu restunum av friðarinnar apologetum, ið mannliga vildu berjast fyri irakiskum suvereniteti.

Jú, orsaka, at eg ikki vildi berjast fyri rættindi hjá Saddam at fremja hugnaliga suverænitets sjálvmorðið av øllum fólkinum í Irak. Hvør kann skilja, at 80 prosent av irakarunum frøast, men at tíðindafólk bert hava áhuga fyri einum manni í rúgvuni, ið rópar ókvæmisorð? At nærum øll lærd og útisetar úr hesum landinum er fyri hesi innrás (hví skal eg so vera ímóti?)

Orsaka Javnaðarflokkurin og orsaka meg Tjóðveldisflokkurin, at eg ikki dugdi at síggja, at neyðugt var at verja Irak, ið hevur lopið á nærum allar sínar grannar og t. d. sent rakettir yvir Ísrael, og ikki vildi loyva vápnaeftirliti í 12 ár. Sjálvandi skuldi eg lært at virt hetta landið, eins og hugnalig lond sum Kosovo, Rawanda, Sudan o. s. fr.

Eg má buka tað inn í skallan á mær, at suverenitetsprinsippið gongur fram um alt og øll áhugamál, fram um mannarættindi, fram um frið, fram um fólkamorð, fram um píning, fram um alt vit og skil. Ein dag fari eg at læra frá Jóanesi og teim knívskarpu tulkingunum frá tjóðveldisflogvitum, sum hava Che hangandi á vegginum, sum vitja baskarnar, sum júst sum allir nationalistar halda, at suverenitetshugtakið skal verjast, um so tað endar við at teir seinstastu ørvitisskøltarnir skjóta hvønn annan. Er suvereniteturin í ordan, ja so kunnu vit kvetta høvdið av øllum við góðari samvitsku, hetta eru okkara høvd og okkara avhøvding í einum suverænum landi. Hvat sigur tú? Nei, her eru einki lík, vit liva í friðsælu.

Tað er líkamikið um eg so dragsi heimsins førandi serfrøðingar í statsbygging, í heimspeki, í løgfrøði, í sosiologi inn í hetta kjak, so eri eg bert, fyri Jóanes, eitt slag av Pizza Åge. Eg eri bert ein yankee-go-home og umboði Kristiligt Lurtarafelag. Bert tí eg havi verið í USA og havi ein stóran áhuga í amerikanskari mentan, eri eg ikki ókritiskur. Eg havi m. a. skrivað eina tulking av øllum hugsandi anti-amerikanskum sjónarmiðum, ið finnast. Einki, ið Jóanes (ið er endaður sum ein illa skøvað 78´ara pláta við Internationale sungið í DDR) sigur hava vit ikki hoyrt frá honum tvey túsund ferð fyrr. Jóanes er eins lættur at rokna út, sum leiðin ein maður við einum reyðum flaggið við hamar og seglið heldur 1. mai.

Sjálvandi er tað vert at kjakast um Michael Moore. Men Moore er eingin listamaður, hann hevur ikki framleitt ein minutt av list. Moore og list eru fulkomnir mótsetningar. Góð list, sum hon hjá Roy Andersson er ikki propaganda. Vit kunnu siga, at Moore er ein intellektuellur, ið eg virði, sum við myndatólinum setur eld á svakligar meiningar í USA t. d. um at øll skulu hava vápn. Vanliga virði eg Moore, men í filminum um Irak og um Bush er hann fulkominliga einstáttaður. Hetta hava øll stór bløð í m. a. Danmark funnist at. (Tá eg sigi »Shame on you«, er hetta bert ein kommentarur, tí tá Moore fekk Oscarvirðislønina fyri ein annan film, segði hann hetta við Bush.)

Tað er sum um Jóanes roynir at endurskapa eina sundurskotna hugmyndafrøði við at rópa um suverenitet fyri mordarar. Sum so er einki nýtt, tí alt tað Jóanes hevur vart hevur fullkominliga vanvirt menniskja alla 20. øld. og sjálvandi skilir hann ikki, at eg og onnur ikki vilja við til hetta utopia, ella hendan »einkistað« ella »óstað«

Enn er spurningurin eftir: Góði Jóanes, Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin, kann eg spyrja tykkum, hvat gera vit við fananskapin í okkara tíð?




KYNDIL

VENJINGARTÍÐIR 2004/2005 · BYRJAR MÁNADAGIN 30. AUGUST

| Lið | Dagur | Klokkan | Stað |
|---|---|---|---|
| Gentur 10 | mánadag | 14.00-15.30 | Høllin á Hálsi |
| Gentur 10 | fríggjadag | 14.00-15.00 | Høllin á Hálsi |
| Gentur 12 | mikudag | 16.30-18.00 | Gundadalshøllin |
| Gentur 12 | hósdag | 16.00-17.00 | Gundadalshøllin |
| Gentur 14 | mánadag | 19.00-20.00 | Gundadalshøllin |
| Gentur 14 | fríggjadag | 18.00-19.00 | Høllin á Hálsi |
| Gentur 16 | mánadag | 19.00-20.00 | Gundadalshøllin |
| Gentur 16 | mikudag | 18.00-19.00 | Gundadalshøllin |
| Gentur 16 | fríggjadag | 19.00-20.00 | Høllin á Hálsi |
| Kv. unglingar | mánadag | 21.30-23.00 | Høllin á Hálsi |
| Kv. unglingar | hósdag | 20.00-21.30 | Høllin á Hálsi |
| Kv.unglingar | fríggjadag | 19.00-20.00 | Høllin á Hálsi |
| 2.-3. deild kvinnur | mánadag | 20.00-21.00 | Gundadalshøllin |
| 1. deild kvinnur | mánadag | 21-30-23.00 | Høllin á Hálsi |
| 1. deild kvinnur | hósdag | 20.00-21.30 | Høllin á Hálsi |
| 1. deild kvinnur | fríggjadag | 19.00-20.00 | Høllin á Hálsi |
| Dreingir 10 | mánadag | 15.30-16.00 | Høllin á Hálsi |
| Dreingir 10 | fríggjadag | 14.00-15.00 | Høllin á Hálsi |
| Dreingir 12 | týsdag | 14.00-15.30 | Høllin á Hálsi |
| Dreingir 12 | mikudag | 15.00-16.30 | Gundadalshøllin |
| Dreingir 12 | hósdag | 15.00-16.00 | Gundadalshøllin |
| Dreingir 14 | týsdag | 15.30-17.00 | Høllin á Hálsi |
| Dreingir 14 | fríggjadag | 16.00-17.00 | Gundadalshøllin |
| Dreingir 16 | týsdag | 17.00-18.30 | Høllin á Hálsi |
| Dreingir 16 | mikudag | 20.00-21.00 | Høllin á Hálsi |
| Dreingir 16 | fríggjadag | 17.00-18.00 | Gundadalshøllin |
| M. unglingar | mikudag | 21.00-22.00 | Høllin á Hálsi |
| 3. deild menn | mánadag | 22.00-23.00 | Gundadalshøllin |
| 1.-2. deild menn | mánadag | 20.00-21.30 | Høllin á Hálsi |
| 1.-2. deild menn | týsdag | 18.30-20.00 | Høllin á Hálsi |
| 1.-2. deild menn | hósdag | 21.30-23.00 | Høllin á Hálsi |

Minihondbóltur byrjar 29. september f. 98-97-96, mikudag kl. 17.15-18.00 í Gundadalshøllini

| | |
|---|---|
| Gentur 10 | f.1994-95 |
| Gentur 12 | f.1992-93 |
| Gentur 14 | f.1990-91 |
| Gentur 16 | f.1988-89 |
| Kv. unglingar | f.1986-87 |
| Dreingir 10 | f.1994-95-96 |
| Dreingir 12 | f.1992-93 |
| Dreingir 12 | f.1992-93 |
| Dreingir 14 | f.1990-91 |
| Dreingir 16 | f.1988-89 |
| M. unglingar | f.1986-87 |



H O N D B Ó L T S F E L A G I Ð K Y N D I L · W W W . K Y N D I L . F O

**Hjálp**

Einlig mamma søkir íbúð/hús í Havn skjótast tilber. Drekki ikki.

Max. 5.500 pr. mðr. við ljós og hita.

**Tlf. 225334**

NÝGGJ KLINIKK
INNAN FÓTRØKT

letur upp 1. september
í Turiðargøtu 25

FÓTKLINIKKIN
V/EYDIS HOLM · TEL 31 55 51
lækna exam. fótrøktari



**JMMotor** - eisini heilsøla av perum

Vit hava øll sløg av perum, um ikki á goymslu, ja, so fáa vit fatur á tí!

Ring ella skriva og fá eina góða avtalu.

J M Motor & Eykalutir Sp/f
Fo-370 Miðvágur
jmmotor@post.olivant.fo
Tlf. 333792 Fax 333692 Mob. 212174

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo